

# Við tær á odda – Stjóri til Kringvarp Føroya

Við tær á odda er Kringvarp Føroya álitið og framdriftin í føroyska miðlaheiminum. Tað fær samfelagið at skelva og savnast, vinnur tokka millum starvsfólk og borgarar, og tað er staðið, har fólk vilja arbeiða, tí at tey kunnu bjóða eina dygdarvøru, sum eingin annar miðil kann.

## Stjórastarvið

Sum stjóri í Kringvarpi Føroya hevur tú fyrst og fremst ábyrgdina av at leiða stovnin fram í móti settum málum. Tú hevur dagligu programmábyrgdina og fyrisitingarligu og búskaparligu leiðsluna av stovninum. Kringvarp Føroya varð skipað 1. januar 2005, tá ið Útvarpið og Sjónvarpið vórðu samanløgd, og partur av uppgávum tínum verður tí eisini at fremja endaligu samanleggingina í samráði við Kringvarpsstýrið.

## Umsøkjarin

Tú ert fremst av øllum ein góður leiðari og hevur áhuga fyri stovninum. Tú evnar at seta tær greið mál og ført starvsfólkið at fylgja tær fram ímóti hesum málum. Tú ert álitisvekjandi, hevur menniskjainnlit, dugir at taka dagar ímillum og hevur góð evni at samstarva og samskifta. Tú hevur hægri útbúgving og leiðsluroyndir. Fjølmiðlaútbúgving og fjølmiðlaroyndir eru ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

## Setanarviðurskifti

Kringvarpsstjórin er løntur samsvarandi 38. lønarflokki hjá Tænastumannafelagi landsins, tó uttan at vera tænastumaður. Starvið er áramálssett í fimm ár, við møguleika fyri leingjan. Aftur at lønini verður givin áramálsviðbót og 15% í eftirlønargjaldi.

## Umsóknir

Umsóknir við CV, prógvum og øðrum viðkomandi skjølum kunnu sendast við vanligum brævi til:

Kringvarp Føroya
Postboks 1299
110 Tórshavn
Att. Kringvarpsstýrið

ella við teldubrævi til Rúna Heinesen, formann í Kringvarpsstýrinum, á runih@tsk.fo.

Umsóknarfreistin er 4. februar 2008.

Tú kanst fáa meira at vita um starvið við at venda tær til Rúna Heinesen á 21 44 07 ella á runih@tsk.fo.

*Um Kringvarp Føroya*

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini, og sum verður stjórnaður av einum stýri við sjey limum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá lýsingum og spæli. Fíggjarætlanin er umleið 60 mió. kr., og útivið 100 fólk starvast á stovninum.*

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur
Postboks 1299 FO-110 Tórshavn
Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01
www.kringvarp.fo

SENDISTOVAN